# Mál- og avrikssáttmáli millum

# Heilsumálaráðið
# og
# Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu / Deildina fyri Gransking og menning
# 2012

**Visjón**
Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og Deildin fyri Gransking og menning skal vera ein kliniskur og epidemiologiskur førleikadepil innan umvhørvismedisin og fólkaheilsu.

**Missión**
Arbeiðsuppgávurnar hjá Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu eru at kanna einstaklingar fyri sjúku ella mein av arbeiðsávum; at meta um arbeiðsførleika, serliga í sambandi við fyritíðarpensjón, endurbúgving og yrkisráðgeving annars; at ráðgeva Arbeiðseftirlitinum og Skipaeftirlitinum í arbeiðsmedisinskum spurningum; at skipa fyri sjúkufyribyrgjandi arbeiði og at fremja granskingarvirksemi innan arbeiðs- og almannaheilsu.

**Inngangur**
Deildin hevur, síðani hon varð sett á stovn í 1988, skipað fyri ymiskum granskingarvirksemi bæði innan umhvørvis-og arbeiðslæknafrøði og fólkaheilsu. Hetta virksemið, sum hevur verið í neyvum samstarvi við starvsfelagar í Evropa, USA og Asia, er fíggjað við peningi úr almennum og privatum grunnum í USA, ES, Danmark og Føroyum. Ein megintáttur í granskingini er, hvussu dálkingin í heimshøvunum ávirkar heilsuna hjá børnum og vaksnum. Granskingin hevur serliga snúð seg um árin á nervalagið hjá børnum, men nú er deildin farin undir umfatandi kanningar av sukursjúku millum tilkomin og eldri fólk. Harumframt er deildin farin undir at kanna immunskipanina hjá smábørnum og tannáringum. Hesar granskingarætlanir halda eftir ætlan fram í fleiri fíggjarár.

**Kjarnuøkið**
Deildin skal taka sær av:

- Kanna einstaklingar, sum aðrir læknar, myndugleikar, fakfeløg v.m., senda til kanningar fyri samband millum arbeiðsumhvørvi og heilsu.
- Kanna bólkar av arbeiðsfólki, har illgruni er um, at arbeiðsumhvørvi ávirkar heilsu teirra.
- Veita Arbeiðseftirlitinum og Skipaeftirlitinum abeiðsmedisinskan stuðul í teirra málsviðgerðum, íroknað upplæring av kommunulæknum til at kunna skriva heilsuprógv til sjófólk og kavarar.
- Gera metingar av arbeiðsførleikum fyri Almannastovuna.
- Gera metingar av vinnusjúkum fyri Føroya Vanlukkutryggingarráð.
- Gera kanningar fyri Fólkaheilsuráðið.
- Gera vísindaligar kanningar av fólkaheilsuni og umhvørvisárinum í víðari merking.
- Skriva og tala í miðlum til tess at stimbra fólkaheilsuni og betra um arbeiðsumhvørvið
- Skipa fyri og luttaka í vísindaligum ráðstevnum bæði heima og úti í heimi.
- Fáa til vega fígging til granskingarætlanir.

**Virksemi í 2012**

| **Øki** | **Evni** | **Endamál** | **Tiltøk** |
|---|---|---|---|
| Sjúklingar | Kanning av sambandi millum arbeiðslív og heilsustøðu | Staðfesta orsøk til sjúku og greiða sjúklinginum frá úrsliti og avleiðingunum | Siga eftirlitsmyndugleikum á sjógvi og landi frá hesum. Boða Arbeiðsskaðatrygging og møguliga Almannastovuni frá tí staðfesta |
| Sjúklingar | Kanning av arbeiðsførleika | Meta um hvat arbeiði sjúklingurin kann klára og taka støðu til møguligt avlamni | Siga arbeiðsplássi ella myndugleika frá hesum |
| Tænasta til aðrar myndugleikar | Geva arbeiðsmedicinskar og serfrøðiligar metingar til Arbeiðseftirlitið og Skipaeftirlitið | At lýsa fyrisitingarmál við tí læknafrøðiliga partinum | 1. Gera váðametingar av ymsum eksponeringum mótvegis einstaklingum og bólkum av arbeiðstakarum<br>2. Gera váðametingar av ymsum eksponeringum mótvegis einstaklingum og bólkum av arbeiðstakarum |
| Undirvísing av læknum | Geva læknum lóggilding sum sjóvinnulæknar og sum kavaralæknar | Gera læknarnar greiðar yvir krøvini í føroyskum kunngerðum viðvíkjandi heilsuni hjá sjófólki og kavarum | Allir kommunulæknar og kommunulæknaavloysarar koma á deildina á skeið til tess at fáa autorisasjón at skriva heilsuprógv til sjófólk |
| Fólkaheilsukanningar | Leggja til rættis og gjøgnumføra kanningar, har einstaklingar luttaka | At staðfesta sambandið millum lívsshátt, umhvørvi og heilsustøðu | Gera niðurstøður, sum kunnu nýtast í fólkaheilsuarbeiðinum |
| Vísindaligar kanningar | Kohortukanningar | At fylgja heilsustøðuni og samanbera við áður innsavnað eksponeringsdata | At gera niðurstøður, sum heilsumyndugleikar heima og úti í heimi kunnu brúka í markvirðisásetingum |
| Peningaligt tilfeingi | Fígging av granskingarverkætlanum | Kohortukanningar eru serliga dýrur | Tí er neyðugt at søkja pening frá sterkum fíggjarkeldum sum: |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | kanningarháttur, við tað, at fólk skulu flytast úr bygd og bý til kanningar í Sigmundargøtu. Hesi skulu hava kompensatión fyri mista arbeiðsinntøku, og eisini er neyðugt, at fáa serfrøðingar uttan úr heimi, eins og kanningartól eru fyri neyðini. | 1. EU<br>2. Miljøstyrelsen í Danmark<br>3. Det Strategiske Forskningsråd<br>4. National Institute of Health, umvegis Harvard School of Public Health<br>5. Granskingarráðnum |
| Umsiting | 1. Umsiting av Landslæknahús-unum<br>2. Fíggjarstýring<br>3. Bókhald og roknskap<br>4. Teldutøk journalskipan<br>5. Brævaskifti | Vit eru ein eind, sum umsitingarliga ikki fær hjálp frá øðrum til at reka stovnin. Tó er deildin í Landsneti og Roknskaparskipan Landsins | Vit gera tað, sum er neyðugt at tryggja viðlíkahald, og at krøv og lógir og kunngerðir viðvíkjandi virkseminum á einum almennum stovni verða lúkað. |
| FarGen | Ílegulesa allar føroyingar, sum vilja vera við, soleiðis, at tá ið persónurin í diagnostiskum ella viðgerðarhøpi hevur tørv á tí, fer at kunna slá upp í hesa íleguskrá. | Endamálið er at skapa ein víðfevndan granskingarmøgu-leika, tá ið íleguskrá-in verður nýtt saman við ættarbands-skránni og diagnosu-skránni í heilsuverk-inum. | 1. Fáa til vega góðkenningar frá ymsu myndugleiku-num, so sum Vísindasiðseminevndi ni og Dátueftirlitinum.<br>2. At fáa til vega tilsagnir um samstarv við útlendskar veitarar av analysum, kunn-ingartøkni og annars neyðugt know-how, til tess at fáa hesa stóru skipan at virka. |

**Fíggjar- og starvsfólkaviðurskifti**
Fíggjarjáttanin til stovns nr. 121020, Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu,er í 2012 1.658 t.kr. Fíggjarætlan verður løgd við ársbyrjan, so játtanin heldur alt árið.

Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu hevur 2,5 ársverk.
<u>Í 2012 hava vit eina fíggjarætlan fyri stovns nr. 143513 upp á kr. 3.155. Í 2012 rokna vit við 5,5 ársverkum.</u>

**Sáttmálaskeið**
Hesin sáttmálin er galdandi fyri alt árið 2012.
Eftirmeting av sáttmálanum verður gjørd saman við aðalstjóranum í Heilsumálaráðnum á heysti 2012.

Tórshavn, 10. mai 2012

| | |
|---|---|
| Heilsumálaráðið | Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og Deildin fyri gransking og menning |
| Poul Geert Hansen, aðalstjóri | Pál Weihe, yvirlækni |